# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Føroya Handilsskúli, Tórshavn:

## Fyrstu næmingarnir fingið akademiútbúgving

**27. apríl 2007 var prógvhandan og hátíðarhald fyri teimum fyrstu lesandi, sum hava lokið "Akademiútbúgvingina" á Føroya Handilsskúla**

**PRÓGVHANDAN**
*Myndir: PhotoCare*

Føroya Handilsskúli ynskti at markera, at fyrstu lesandi vóru liðug við "Akademiútbúgvingina", og tað var hátíðarhildið við prógvhandan.

12 lesandi, sum starvast innan bæði privata vinnulívið og á almennum stovnum, fingu prógv. Á "Akademiútbúgvingini" ber til at velja sær ávísa breyt. Tey, sum nú hava lokið Akademiútbúgving hava útbúgvi seg innan marknaðarførslu, samskifti og búskap sum sergrein.

Í sambandi við próvhandanina vóru fleiri røður. Reidar Nónfjall, stjóri á Føroya Handilsskúla, umrøddi m.a. í síni røðu gongdina frá tí Akademiútbúgvingin byrjaði á Føroya Handilsskúla til í dag. Somuleiðis umrøddi Reidar, hvørjar møguleikar eru í útbúgvingini og hvørjar ætlanir eru viðv. útbúgvingini.

Richard Mortensen, stjóri á FT Samskifti og undirvísari á Akademiútbúgvingini, kom í síni røðu m.a. inn á, hvussu týdningarmikið tað er fyri Føroyar sum heild og fyri tann einstaka, at útbúgva seg. Somuleiðis helt Richard, at tað í veruleikanum eru alt ov fá, sum kenna Akademiútbúgvingina. Um tú millum fólk spyr, um tey kenna Akademiútbúgvingina, verður ofta svara: "Aka – hvat fyri nakað" – Og tað hóast Akademiútbúgving er sera viðkomandi og tey, sum hava lokið útbúgvingina, gera tað á einum høgum fakligum støði.

Aina L. Knudsen, útbúgvingarleiðari fyri Akademiútbúgvingina, ásannar, at Føroya Handilsskúli helst ikki hevur gjørt nóg nógv við at kunnað um útbúgvingina og teir mongu møguleikarnar, ið hon bjóðar. Og at hetta eigur Handilsskúlin at bøta.

Fróði Magnussen, stjóri á Formula og undirvísari á Akademiútbúgvingini, hugleiddi m.a. broytingar. Í dag verður javnan tikið til, at vit liva í eini við stórum broytingum, men áður er bæði stórar og víðfevndar broytingar farnar fram. Tað, sum er øðrvísi í dag, er hetta at broytingarnar, hóast tær ikki altíð eru so víttfevnandi, seta stór krøv til okkara førleikar og vitan. Og harvið eisini áhaldandi krøv til førleikamenning – og til útbúgving.



*Tey sum fingu prógv handað vóru: Aftasta rað: Rúni Jákupson Jakobsen, Súni Sigvaldsson Kristiansen, Lene Rosengaard, Ingvard Fjallstein, Albert Ellefsen og Henrid Johansen.*
*Fremsta rað: Katrin Sloan Nielsen, Ingrid Gregersen, Súsanna Jacobsen, Jónley Lava, Malan Joensen Tauser og Thea Joensen*



*Reidar Nónfjall, stjóri á Føroya Handilsskúla*



*Fróði Magnussen, stjóri á Formula og undirvísari á Akademiútbúgvingini*



*Súsanna Jacobsen fær prívið handað*

### FAKTA

Um Akademiútbúgvingina á Føroya Handilsskúla: Vinnulig – ella sonevnd merkantil – útbúgving – við møguleikum at førleikamenna seg innan eitt nú leiðslu, marknaðarførslu og búskap.

Útbúgvingin er skipað í modulir. Til ber at taka støk modulir (lærugreinir), men til at fáa fulla Akademiútbúgving krevst, at tann lesandi tekur 6 modulir.

12 lesandi hava lokið útbúgvingina síðan hon var sett á stovn í 2003.

56 lesa í løtuni á útbúgvingini á Føroya Handilsskúla.

Akademiútbúgvingin er ein uppgradering av vælkendu merkonom útbúgvingini

*Kelda: Aina L. Knudsen og www.fh.fo*



*Føroya Handilsskúli markeraði at fyrstu lesandi vóru liðug við »Akademiútbúgvingina«*



*Reidar Nónfjall, handilsskúlastjóri handar Súna Sigvaldsson Kristiansen prógvið*